

## United vil hava Benzema

Roknað verður við, at Manchester United nú fer at leggja nógv fyri í royndini at keypa franska framherjan karim Benzema, eftir at bæði Ronaldo og Tevez fara úr United. Og okkurt bendir á, at Lyon er til reiðar at selja evnaríka spælaran. Stjórin í felagnum sigur, at um United kemur við einum nóg stórum boði, so kann tað verða, at teir selja. United sleppur neyvan niðanfyri 200 milliónir krónur í keypsprísinum.

## Kom til dyst!

Kongsvinger, har millum onnur Julian Johnson hava spælt, er í svárum fíggjarligum trupulleikum. Nú er so galið, at venjarin í felagnum hevur byrjað eitt ketu sms. – Nú er tað álvara. Kom og síggj Kongsvinger – Skeid á Glemselund í morgin. Tað eru nóg mikið av atgongumerkjum, so tak vinir og familju við. Hetta er um at bjarga felagnum... Mann saknar onki, fyrr enn mann hevur mist tað. Send hesi boð víðari til øll tú kennir, stendur millum annað sambært glomdalen.no í smsinum, sum venjarin, Tom Nordlie hevur sent til øll á síni telefonbók á síni fartelefon.
Hóast Kongsvinger hevur reyvina í vatnskorpuni fíggjarliga, so er liðið á einum øðrum plássi í næstbestu deildini, og liggur til uppflyting.

Føroyar-Bosnia 21-27 (9-19):

# Avgjørdu fyri steðgin

**Føroyska hondbóltslandsliðið kom ongan tíð av álvara í nær námind Bosnia-Herzegovina, tá seinasti dysturin í EM-undankappingini varð spældur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroyska manslandsliðið í hondbólti endaði leygardagin sína luttøku í EM-undankappingini.

Mótstøðuliðið hesa ferð var Bosnia-Herzegovina, sum ikki verður styrkismett millum tey heilt sterku liðini í bólkinum, men mótstøðan var tó ríkiliga stór fyri okkara menn.

Í mun til fleiri av hinum dystunum, sum føroyska liðið hevur spælt, so eydnaðist tað als ikki okkara at fáa nakað tak um dystin hesaferð.

Bosnia bumbaði føroyska málið sundur og saman fyri steðgin, og so munaði tað lítið, at okkara komu betur við seinna hálva tíman. Tá kundi mótstøðan eisini loyva sær at seta ferðina nakað niður, tí í vanda var sigurin ongantíð.

Soleiðis endaði fyrsta luttøkan á hesum sinni uttan stig hjá okkara hondbóltsmonnum.

Russland vann okkara bólk við 18 stigum. Serbia, sum eisini kemur við til endaspælið, vann 15 stig, Bosnia-Herzegovina fekk 13 stig, Schweiz hevði 9 stig. Italia 5 stig og Føroyar endaðu altso niðast uttan nakað stig yvirhøvur.



*Føroyska landsliðið fekk av at vita, tá Bosnia vitjaði í seinasta undankappingardystinum í nú lidnu undankappingini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Hanus liðugur í B36

**Skálamaðurin, sum hevur spælt við B36 seinastu trý árini, er ikki longur partur av Vodafone-hópinum hjá B36**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hanus Thorleifsson var ikki við í hópinum, tá B36 leygrdagin spældi heimadyst móti 07 Vestur.

Orsøkin var heilt einfalt, at Skálamaðurin ikki longur er partur av Vodafone-hópinum hjá B36.

- Eg kann vátta, at Hanus Thorleifsson hevur biðið um at verða loystur úr sáttmálanum, og at vit hava eftirlíkað hesum, sigur Havgrímur Johannesen vegna FC Tórshavn, sum rekur Vodafone-liðið hjá B36.

Aðrar viðmerkingar fáast ikki úr felagnum, men sum skilst hevur Hanus Thorleifsson verið alt annað enn nøgdur um lítlu spælitíðina, sum hann hevur fingið í ár.

Frá at hava verið ein av berandi kreftunum á liðnum, hevur spælarin als ikki verið eins sjónligur í ár. Og frustratiónirnar kókaðu eftir øllum at døma yvir, tá B36 seinasta mikukvøld spældi í Klaksvík.

Tá varð Hanus Thorleifsson skiftur út í hálvleikinum, og valdi hann tá at fara beina leið undir brúsu og heim, ístaðin fyri at hyggja at seinna hálvleiki av dystinum.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa eina viðmerking frá Hanusi Thorleifsson sjálvum.



*Hanus Thorleifsson er ikki longur partur av Vodafone-hópinum hjá B36*

## VB/Sumba tók ikki av

**B71 bjargaði sær javnleik á Eiðinum, soleiðis at teir hildu fast um uppflytarasessin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við fyrimuninum av heimavølli hevði VB/Sumba leygardagin møguleikan at klintra upp um B71 í dystinum um uppflyting til Vodafone-deildina.

Heimaliðið var eisini á odda í dystinum, men tað eydnaðist gestunum at javna eftir steðgin, og soleiðis at B71 framvegis á beinari uppflytingarkós.

Samstundis er TB av álvara farið at gera um seg. Tvøramenn vóru hesa ferð á Toftum, har B68 hevur fingið sera góð úrslit í ár, men tað eydnaðist gestunum at fara heim við einum sigri, soleiðis at teir nú eru ájavnir VB/Sumba.

Og í niðara endanum av talvuni er Skála spakuliga í ferð við at toga seg uppeftir. Hesa ferð vann Skála á útivølli móti FC Hoyvík, sum púrasta tykist uppsteðgað. Munurin upp til næsta liðið minkaði tó ikki, tá Víkingur vann í sannari málveitslu í Miðvági.

**Úrslitini leygardagin:**
FC Hoyvík-Skála: 0-1
VB/Sumba-B71: 1-1
B68-TB: 2-4
HB-NSÍ: 2-2
MB-Víkingur: 3-5